# Jóna Mortensen forkvinna í Føroya Væl

Føroya Væl hevur havt aðalfund, har nýggj nevnd varð vald. Nýggja nevndin sær soleiðis út: Jóna Mortensen, forkvinna, Jóhan Petur Johannesen, næstformaður, Annfinn Brekkstein, kassameistari, Martin Pauli Jacobsen, skrivari, Janus Djurhuus, eykalimur, Líggjas Høgnesen, eykalimur. - Nevndin fegnast um, at flokkurin aftur situr við landsins leiðslu og tekur fult undir við politikki floksins. Tað er av alstórum týdningi fyri Føroyar og tað føroyska fólkið, at Sambandsflokkurin myndar landsins stjórn. Blokkniðurskurðurin hevur longu gjørt nógvan skaða á samfelagið, tað síggja vit dømi um hvønn dag. Tað er nú, vit hava brúk fyri einum sterkum ríkisflokki, skrivar felagið.





*Fundarfólkið á aðalfundinum í Føroya Arbeiðarafelag í morgun hoyrdu Ingeborg Vinter greiða frá teimum ábótum, sum ærtlanin nú er at gera í ALS skipanini og sum fer at føra til nógv hægri útgjald enn nú*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Arbeiðsleys nógv hægri gjald úr ALS

**Stýrið fyri ALS hevur nú mælt til, at úgjaldið til arbeiðsleys verður hækkað munandi og nú veldst bara um antin politikararnir taka undir við tilmælinum og seta tað í gildi**

ALS-ÚTGJALD
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú er ætlanin at útgjaldið úr ALS til arbeiðsleys skal hækkast munandi.

Stýrið fyri ALS hevur viðgjørt spurningin um at bøta um skipanina og úrslitið av er, at stýrið nú hevur mælt til at hækka útgjaldið munandi og harafturat hevur stýrið mælt til at gera fleiri aðrar ábøtur á skipanina.

Tað var í november at landsstýrismaðurin í vinnumálum, Johan Dahl, heitti á stýrið í Als um at broyta lógina, upplýsti Ingeborg Vinther, forkvinna á Føroya Arbeiðarafelag í ársfrágreiðing síni á aðalfundinum í felagnum í morgun.

Hon er eisini limur í ALS stýrinum og hon segði í ársfrágreiðingini, at nú er stýrið so komið við nøkrum uppskotum um at bøta um ALS og hesi uppskotini eru nú til viðgerar í politisku skipanini.

Og nú stendur tað so til politikararnar, um teir vilja seta tilmælið í gildi, ella ikki.

### Fiskafólk betri sømdir

Tað fyrsta, ið stýrið gjørdi, var at broyta reglugerðina fyri fiskavirkisskipanina frá 1. jan. í ár, soleiðis, at nú kann farast beinleiðis upp í ALS, uttan nakra uppsøgn, tá ið fiskavirki hevur staðið stilt í minsta lagi fýra vikur, og einki arbeiði hevur verið.

– Trupulleikin hevur verið, at tá ið fólk søgdu upp á einum flakavirki, tí at einki arbeiði hevði verið í fleiri vikur, og virkið ikki vildi koma við uppsøgn, fingu tey karantenu í fýra vikur, men hetta er so broytt, segði Ingeborg Vinther.

### Nógv hægri útgjald

Annars sigur Ingeborg Vinther, at stýrið fyri ALS mælir nú til, at hvørt nýggjár skal útrokningargrundarlagið roknast av nýggjum.

– Nýggja útrokningargrundarlagið kann tó ongantíð vera lægri enn tað fyrsta útrokningargrundarlagið.

Somuleiðis verða bíðidagar, ið hava verið upp til 10 dagar, nú strikaðir.

Annars heldur stýrið, at útgjaldið úr ALS skal verða 80% í eitt ár og síðani 75%.

Tó verður dagatalið í skipanini stytt 75 dagar í ár og 75 dagar næsta ár.

Men aftur ímóti kunnu arbeiðsleys nú fáa stuðul av eini inntøku upp til 240.000 krónur um árið, men tó kann útgjaldið í mesta lagi vera 20.000 krónur um mánaðin tað fyrsta árið, men so lækkar tað niður í 18.500 krónur um mánaðin.

- Hetta merkir, at nú skal útgjaldið ikki longur roknast út eftir eini arbeiðaraløn.

Somuleiðis verður ein serskipan nú gjørd fyri fiskimenn.

- Tað hevur longu verið tosað um at fáa eina skipan fyri fiskimenn, serliga tá ið skip liggja leingi vegna umvælingar og tílíkt, segði Ingeborg Vinther

Tað skilst, at tað er ikki ætlanin, at hetta fer at føra við sær, at neyðugt verður at hækka inngjaldið til skipanina.

### Ikki lætt

Forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag sigur, at tað hevur ikki verið lætt at fáa semju í lag, tá ið áskoðanirnar í stýrinum eru so ymiskar um, hvat ið skal broytast, og hvussu tær skulu fremjast.

– Men nú er tað so eitt heilt annað, hvørja politiska lagnu málið fær, tá ið tað kemur til viðgerðar á tingi, leggur hon afturat.

Sjálv vónar hon, at tað, sum stýrið er komið ásamt um, verður tikið til eftirtektar.

- Eitt er so vist, at koma hesar broytingar ígjøgnum, verður Arbeiðsloysisskipanin betri, enn hon hevur verið, segði Ingeborg Vinther.

# Offra før á altarinu

**- Nú er vandi fyri, at føroysk arbeiðsmegi fullkomiliga verður givin upp til skutils og so noyðast vit at mæla frá, at vit fara upp í nógv umrødda EBS samstarvið í Evropa, gjørdi Ingeborg Vinther púra greitt á aðalfundinum í Føroya Arbeiðarafelag í morgun**

ARBEIÐSMARKNAÐUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað er avgerandi neyðugt, at vit fáa eina lóg sum sigur, at allir útlendskir arbeiðsgevarar, sum koma henda vegin, skulu fylgja føroyskum sáttmálunum og annars teimum lógum og treytum, sum eru galdandi á føroyska arbeiðsmarknaðinum.

Tað staðfesti Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag á aðalfundi felagsins í morgun.

Hon sigur, at fara vit upp í nógv umrødda EBS samstarvið í Evropa og fáa tey fýra frælsini, uttan at vit hava fingið eina tílíka lóg, eru vit fullkomiliga givin upp til skutils.

- Tá hava arbeiðsgevarar úr øllum Evropa rætt at koma henda vegin við tænastuveitingum, uttan at fylgja føroyskum sáttmálum, lógum og reglum, sigur hon.

- Vit royna tískil av øllum alvi at fáa skil á hetta økið, leggur hon afturat.

Hon sigur, at verða greiðar lógir og ásetingar ikki gjørdar um rættindi og skyldur, noyðist Føroya Arbeiðarafelag at mæla frá, at vit gerast partur av EBS.

- Tað er ikki sjálvum EBS-sáttmálanum, tað er galið við, men við okkara vantandi huga at gera neyðugu fylgilógirnar. Hetta síggja vit úrslitið av í dag viðvíkjandi íslandssáttmálanum, leggur forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag afturat.

### Ongan politiskan stuðul

Annars átalar Ingeborg Vinther, at lógin um evropiska arbeiðsmegi varð samtykt, hóast allur tann privati arbeiðsmarknaðurin mótmælti.

- Hetta lýsir væl, hvønn stuðul fakfeløgini hava í løgtinginum, sigur Ingeborg Vinter í ársfrágreiðing á aðalfundinum í Føroya Arbeiðarafelag í morgun.

Hon ger púra greitt, at útlendingar í Føroyum skulu hava somu rættindi og skyldur sum føroyingar – hvørki meir, men heldur ikki minni.

Hon vísti á, at í hinum Norðurlondunum eru útlendingar ferð eftir ferð fyri vanbýti á arbeiðsmarknaðinum, og hetta er við til at máa støðið undan sáttmálunum.

- Útlendingar eru bíligari og hetta gera ávísir arbeiðsgevarar sær dælt av.

### Royndu at forða

Hon segði, at saman við Fiskimannafelagnum og Havnar Arbeiðsmannafelag, gjørdi Føroya Arbeiðarafelag sera nógv fyri at forða, at lógin um evropiska arbeiðsmegi varð samtykt.

- Vit vóru á óteljandi fundum við landsstýrið og politisku flokkarnar og tá lovaði Helena Dam á Neystabø, sum var landsstýriskvinna við lógarmálum, at øll okkara ynski, kundu setast í verk – uttan eitt.

Men hetta vísti seg bara ikki at vera satt, tí vit fingu tvey ynski ígjøgnum. Annað er, at øll skulu hava setanarbræv og hitt er, at fer arbeiðsloysið upp um 3,5% í